SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg eri harmur um, at eg ikki megnaði at liva upp til ta ábyrgd, sum tit væntaðu av mær*

*Eliot Spitzer, guvernørur*

# Russar grenja ov illa

**Leiðslan í NATO er troytt av teimum nógvu atfinningunum úr Moskva og vil hava russisku leiðsluna at gevast við grenjinum**



*Vladimir Putin og eftirmaðurin Dmitrij Medvedev*

*Mynd. AFP*

-Vit hava hoyrt alt ov nógv av hasum atfinningunum úr Moskva, og nú er nóg mikið, sigur NATO-talsmaðurin James Appathurai.

Tann 17. mars fara amerikonsku ráðharrarnir Condoleezza Rice og Robert Gates til Moskva at tingast við russisku leiðsluna, og sambært amerikonskum embætismonnum hava tey fleiri punkt, sum tey fegin vilja tosa við teir russisku leiðararnar um.

Skalt alt, sum russisku leiðararnir hava sagt teir seinastu mánaðirnar, takast í álvara, so hava partarnir nógv at tosa um. Á einari ráðstevnu í Lissabon í oktobur segði fráfarandi forsetin, Vladimir Putin, at amerikanska ætlanin at seta rakettverju upp tætt við russiska markið er ein líka vandamikil avgerð, sum tá russar gjørdu av at seta rakettir upp á Kuba.

### Nýggj vápnadubbing

-Amerikanska rakettverjuætlanin ger, at vit hava eina støðu, sum líkist støðuni í 1960-árunum, segði Putin á hálvárliga fundinum millum ES og Russland í oktobur í fjør. Seinni hevur Putin sagt, at amerikanska rakettverjuætlanin verður byrjanin til eina nýggja vápnakappdubbing.

- Tað er ikki okkara skyld, tí tað var ikki vit, sum byrjaðu. Vit stongdu okkara støðir í Kuba og í Vietnam. Men hvat fáa vit afturfyri? Jú, amerikanskar støðir í Rumenia og Bulgaria og rakettverjustøð í Póllandi, segði fráfarandi russiski forsetin herfyri.

- Nú mugu tit gevast við hasum grenjinum, er svarið av NATO-høvuðsstøðini.

# Vilja hava Venesuela og Chavéz á svartalista

**Amerikanskir politikarar vilja hava Venesuela sett í bás saman við Norðurkorea og Iran**



*Á latínamerikanska toppfundinum herfyri sat venesuelski forsetin, Hugo Chávez, undir liðini á forsetanum í Nikaragua, Daniel Ortega*

*Mynd: AFP*

Myndugleikarnir í Kolombia siga seg hava prógv fyri, at Venesuela hevur arbeitt saman við kolombisku uppreistrarrørsluni FARC, og at venesuelski forsetin, Hugo Chávez, hevur stuðlað FARC fíggjarliga.

Tað hevur fingið fleiri amerikanskar politikarar at krevja, at USA skal seta Venesuela á svartalistan við londum, sum styðja yvirgang. Londini, sum standa á listanum nú, eru Norðurkorea, Iran, Sýrialand, Sudan og Kuba.

Millum politikararnar, sum vilja hava Venesuela og Hugo Chávez á svartalista, eru republikonsku kongresslimirnir Ileana Ros-Lethinen og Cannie Black. Tær hava saman við øðrum sent Hvítu Húsunum eina áheitan um at fáa Venesuela skrásett sum eitt land, ið styðjar altjóða yvirgang.

Hvítu Húsini hava ikki svarað áheitanini. Uttanríkisráðið í Washington hevur funnist at leiklutinum hjá Venesuela og Chavéz í Kolombia, men politiskir eygleiðarar vænta ikki, at Venesuela kemur á svartalista, tí USA keypir nógva olju haðani.

## STUTT SAGT

### Kýprar hittast

Demetris Christofias, sum varð valdur til forseta í tí grikska partinum av Kýpros í síðsta mánað, hevur fingið lyfti um ein fund við leiðaran í turkiska partinum av oynni, Mehmet Ali Talat. Tá hann var valdur, heitti Christofias á ST um at virka fyri einum fundi teirra millum, og nú hevur turkiski leiðarin játtað at koma á fund tann 21. mars, skrivar Reuters. Fundurin verður á ST-borgini í Nicosia. Endamálið hjá grikska leiðaranum er at blása lív í friðartilgondina, sum fór fyri bakka í 2004. Ta ferðina góðtóku teir turkisku kýprarnir eina friðarætlan, men teir griksku kýprarnir vrakaðu hana.

### Skitið í London

Ein kanning millum amerikonsk ferðafólk, sum hava ferðast kring Evropa, vísir, at ferðafólkini halda London vera tann skitnasta býin í Evropa. London er eisini tann dýrasti býurin at vera í, siga tey, men hinvegin kann bretski høvuðsstaðurin bjóða teimum fremmandu tað besta náttarlívið. Reinasti býur í Evropa er Zürich í Sveis. Kekkiski høvuðsstaðurin Prag er tann besti, tá tað snýr seg um at fara til handils, og næstir honum koma Budapest og Lissabon. Norðurlendsku býirnir standa seg ikki serliga væl. Eitt nú fær Oslo ummæli sum triðdýrasti býurin at vitja.

### Gamal skøltur

Grikskir fornfrøðingar hava funnið ein gamlan skølt, sum teir siga vera av einari ungari kvinnu. Skølturin stavar eftir øllum at døma frá 3. øld, men tað sermerkta við honum er, at fornfrøðingarnir hava funnið týðilig tekin um, at kvinnan hevur fingið skurðbiðgerð í høvdinum. Hetta var kortini ikki óvanligt tá á døgum, tí vísindin hevur prógv fyri, at grikskir læknar framdu slíkar skurðviðgerðir longu í 5. øld fyri Kristi føðing og rómverskir læknar nakað seinni.